# Bygdarráðsfundur – stytt gerðabók

## Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 18.01.2019 kl. 17.30

Á fundi:
Janus Thomsen
Eir J. Norðberg
Magni Bertholdsen
Niels Olaf Eyvindsson
Gunnhild Mortensen
Rúni Thomsen
Sten Spange Larsen

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

Formaðurin bað undan fundinum um loyvi at taka tvey mál við – koma á skrá sum nr. 8 og 9.

1. **Val av varaborgarstjóra.**
   Val av varaborgarstjóra fer fram sambært § 6, stk. 3 í Kommunustýrislógini.
   Uppskot frá Janus Thomsen um, at Eir J. Norðberg heldur fram sum varaborgarstjóri, eftir at Trúgvi Gudmundarson endaliga er farin úr bygdarráðnum.
   Samtykt við 6 atkvøðum fyri. Magni Bertholdsen tók ikki undir við hesum.

2. **Val av føstum nevndum.**
   Val av føstum limum og tiltakslimum í bygdarráðsnevndunum á skránni. Valið av nevndunum fer fram sambært §§ 3 og 28 í Kommunustýrislógini.

   Undan fundinum hevur ongin bygdarráðslimur boðað frá, at tey ganga saman í valbólk. Borgarstjórin spurdi á fundinum, um talan er um ein ella fleiri valbólkar. Semja er um ein valbólk. Nevndirnar skipa seg sjálvar við formanni, undantikið fíggjarnevndin.

   Valbólkurin var samdur um niðanfyri nevndu limir í føstu nevndirnar.

   - **Fíggjarnevndin:** Borgarstjórin er føddur formaður.

     | *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
     |---|---|
     | 1. Janus Thomsen, einmælt samtykt | (Gunnhild Mortensen), einmælt samtykt |
     | 2. Magni Bertholdsen, einmælt samtykt | (Sten Spange Larsen), einmælt samtykt |
     | 3. Eir J. Norðberg, einmælt samtykt | (Niels Olaf Eyvindsson), einmælt samtykt |

     Val av fíggjarnevnd einmælt samtykt.

- **Trivnaðarnevndin:**

| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
|---|---|
| 1. Eir J. Norðberg, einmælt samtykt | (Magni Bertholdsen), einmælt samtykt |
| 2. Rúni Thomsen, einmælt samtykt | (Sten Spange Larsen), einmælt samtykt |
| 3. Gunnhild Mortensen, einmælt samtykt | (Niels Olaf Eyvindsson), einmælt samtykt |

Val av trivnaðarnevnd einmælt samtykt.

- **Tekniska nevnd:**

| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
|---|---|
| 1. Niels Olaf Eyvindsson, einmælt samtykt | (Eir J. Norðberg), einmælt samtykt |
| 2. Sten Spange Larsen, einmælt samtykt | (Magni Bertholdsen), einmælt samtykt |
| 3. Gunnhild Mortensen, einmælt samtykt | (Rúni Thomsen), einmælt samtykt |

Val av Teknisku nevnd einmælt samtykt.

- **Vega- og havnanevndin:**

| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
|---|---|
| 1. Gunnhild Mortensen, einmælt samtykt | (Magni Bertholdsen), einmælt samtykt |
| 2. Rúni Thomsen, einmælt samtykt | (Eir J. Norðberg), einmælt samtykt |
| 3. Sten Spange Larsen, einmælt samtykt | (Niels Olaf Eyvindsson), einmælt samtykt |

Val av Vega- og havnanevnd einmælt samtykt.

**Skúlastýrið:**
Eir J. Norðberg - tiltakslimur Janus Thomsen
Rúni Thomsen - tiltakslimur Gunnhild Mortensen
Val til skúlastýrið einmælt samtykt.

**I R F:**
Niels Olaf Eyvindsson - tiltakslimur Gunnhild Mortensen
Val til I.R.F. einmælt samtykt.

**S E V:**
Niels Olaf Eyvindsson - tiltakslimur Magni Bertholdsen
Val til S E V einmælt samtykt.

**Skattakærunevndin:**
Eir J. Norðberg - tiltakslimur Niels Olaf Eyvindsson
Val til skattakærunevnd einmælt samtykt.

**3. Umsókn um stuðul / avtalu fyri 2019 frá Vágs Kappróðrarfelag.**

Søkt verður um fíggjarligan stuðul, møguliga stuðulsavtalu fyri kappróðrarárið 2019.

**Fíggjarnevndin 18.01.2019:**

Nevndin mælir til ikki at stuðla hesum.

**Avgerð:**

Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

**4. Vinarbýar-avtala millum Rollag Kommunu og Hvalbiar Kommunu.**

Uppskot um vinarbýar-avtalu til viðgerðar. Avtalan byggir m.a. á kunning um mentan, søgu, vinnulív og onnur samfelagslig viðurskifti.

**Fíggjarnevndin 18.01.2019:**

Mælt verður til at taka undir við uppskoti um vinarbýar-avtalu við Rollag Kommunu.

**Avgerð:**

Einmælt samtykt.

**5. Tilboð uppá roykvarnarar frá Fønix og Gummibátatænastuni.**

Innkomin tilboð uppá roykvarnarar til Hvalbiar skúla.

| | |
|---|---|
| Fønix: | kr. 17.092,50 v/MVG |
| Gummibátatænastan: | kr. 13.207,60 v/MVG |

**Trivnaðarnevndin 15.01.2019 og Fíggjarnevndin 18.01.2019:**

Báðar nevndirnar mæla til at taka av lægra tilboðnum frá Gummibátatænastuni kr. 13.207,60 v/MVG.

**Avgerð:**

Einmælt samtykt.

**6. Skriv frá dagstovnaleiðaranum.**

<u>Tímar til vøggustovuna í Brosinum</u>:

Vegna økt barnatal í vøggustovuni, verður søkt um at kunna nýta teir eyka tímarnar, sum vórðu játtaðir í september 2018.

<u>Tímar til barnagarðsstovu í Brosinum</u>:

Søkt verður um 20 tímar pr. viku fram til 30. juni 2019. Tímarnir skulu nýtast til børn, sum hava serligan tørv.

**Trivnaðarnevndin 15.01.2019:**

Nevndin mælir til at játta vøggustovuni 13,5 tímar um vikuna tíðaravmarkað og barnagarðsstovuni 20 tímar um vikuna tíðaravmarkað.

**Fíggjarnevndin 18.01.2019:**

Nevndin mælir til at játta vøggustovuni 13,5 tímar um vikuna tíðaravmarkað. Viðvíkjandi uppnormering í barnagarðsstovuni, mælir nevndin til, at játta 20 tímar um vikuna fram til 30. juni 2019, treytað av, at peningurin verður funnin innanfyri verandi játtan hjá dagstovninum.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt at játta vøggustovuni 13,5 tímar um vikuna til 30. juni 2019. Viðvíkjandi barnagarðsstovuni varð einmælt samtykt at játta 10 tímar um vikuna til 30. juni 2019, peningurin til hinar 10 tímarnar verður funnin innanfyri verandi játtan hjá dagstovninum.

7. **Byggisamtyktin.**
Býarskipanarnevndin er komin við nøkrum viðmerkingum til framløgdu byggisamtyktina. Hesar viðmerkingar eru svaraðar og broytingar gjørdar á kortunum.
**Avgerð:**
Samtykt varð einmælt at góðkenna gjørdu broytingar, bæði í sjálvari byggisamtyktini 2019 – 2024 og bygdakortunum til hesa.

8. **Leigusáttmáli millum Hvalbiar Kommunu og Bú- og heimatænastuna í Suðuroy.**
Verandi leigusáttmáli viðvíkjandi sambýlinum í Hvalba er farin úr gildi. Nýtsluvíddin á matr. nr. 224b í Hvalba er 426 m2 og er leigan avtalað til kr. 850 pr. m2 ella íalt kr. 362.100 árliga uttan MVG.
**Fíggjarnevndin 18.01.2019:**
Nevndin mælir til at góðtaka sáttmálan og geva heimild til at undirskriva hann.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

Sten Spange Larsen luttók ikki í viðgerðini av næsta máli.

9. **Umsókn um stuðul til viðlíkahald av Ranhøll frá Bygdarfelagnum á Rananum.**
Tilboð uppá nýggj vindeygu til Ranhøll frá Vágs Timburhandli / H-Dygd kr. 65.525,-.
**Fíggjarnevndin 18.01.2019:**
Einmælt samtykt at mæla til at játta hesum.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

Fundarbókin lisin og skrivað undir          Fundur lokin kl. 18.30